# NORÐURLANDAHÚSIÐ TILTØK SEPTEMBER 2004


Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00
og sunnudagar kl. 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo


## TILTØK SEPTEMBER 2004

**Framsýningin "Burðardygg norðurlendsk byggilist" letur upp 3. september og er í Húsinum til 12. september 2004**

FRÍGGJADAGUR 3. SEPTEMBER
**Kl. 17.00** **Framsýningin "Burðardygg norð urlendsk byggilist" letur upp**

**Kl. 21.00** **Fólkatónleikur í Atlantis í Klaksvík;** 2 trubadurar Johan Piribauer úr Laplandi og Per Warming úr Danmark.

SUNNUDAGUR 5. SEPTEMBER
**Kl. 16.00** **ÆLABOGIN konsertvitjan úr Noregi.** Orkestrini Austfjord Musikkorps og Haug Misikkorps, felagskonsert í Klingruni.

LEYGARDAGUR 11. SEPTEMBER
**Kl. 21.00** **Fólkatónleikur í Stóra Pakkhúsi í Vági** 2 trubadurar John Piribauer úr Laplandi og Per Warmind úr Danmark.

FRÍGGJADAGUR 17. SEPTEMBER
**Kl. 09.00** **Ráðstevna,** innan pedagogik,trivnað hjá børnum. Fyrireikingarbólkurin Undir Brúnni.

LEYGARDAGUR 18. SEPTEMBER
**Kl. 09.00** **Ráðstevna, trivnað hjá børnum heldur fram**

LEYGARDAGUR 25. SEPTEMBER
**Kl. 09.00** **Giktafelagið,** almennur fundur.

**Kl. 15.00** **Listaframsýsing við Mikael Jensen (DK)**

SUNNUDAGUR 26. SEPTEMBER
**Kl. 16.00** **Aavaat-kórið frá Grønlandi,** hevur konsert

TÝSDAGUR 28. SEPTEMBER
**Kl. 19.30** **Fýrhent pianokonsert við Anna-Mari Peltonen og Kati Eriikka Arikoski (FI).**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**


**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**


# FÝRHENT FLYGULKONSERT ÚR FINNLANDI

**Týsdagin 28. september klokkan 19.30 verður fýrhent klaverkonsert í Norðurlandahúsinum, har Kati Ariskoski og Anna-Mari Peltonen úr Finnlandi fara at vísa síni kynstur**

Kati Ariskoski og Anna-Mari Peltonen hava spælt saman sum klaverduo síðan 2000. Tær eru um at gera seg lidnar sum finskir klaverleikarar og lærarar. Tær hava lært fýrhent klaverspæl hjá Carlos Juris professara og Valeria Resjan klaverleikara. Tær hava framført saman sum duo á konsertum í Finnlandi í Helsinki, Seinäjoki "Säveliä elokuussa-chamber music festival" árini 2001, 2002, 2003 and 2004, í Turku "Aboa Nova-festival" og í Eysturríki Austria á "Universität für Musik und Darnstellende Kunst".

Kati Eriika Ariskosi (f. 1979) fór undir sína klaverútbúgving á tónlistaháskúlanum Kuopio í Finnlandi í 1986. Síðan 1999 hevur hon verið studentur í Turku Academy of Arts, har hon verður útbúgvin klaverlærari komandi heyst hjá læraranum Jukka Juvonen. Hon hevur eisini fingið tímar á lærda tónleikahúskúlanum í Graz frá 2001 til 2003. Hon hevur havt eina røð av solokonsertum og hevur verið partur av kamartónleikabólkum í Finnlandi og Eysturríki. Hon hevur eisini spælt saman við filharmoniska orkestrinum í Turku í maj 2004 á einari konsert fyri ungar solistar.

Sum eitt kuriosum kann nevnast, at hon umframt at hava luttikið í kappingum fyri klaver, hevur boksað og gjørdist finskur meistari í 1998. Ein klaverboksari í orðsins sanna týdningi.

Ann-Mari Peltonen (f. 1980) fór at spæla klaver sum fimm ára gomul saman við mammu síni Raili Peltonen og helt fram við Carlos Turriago á tónleikaháskúla. Í 1999 byrjaði hon á Academy of Arts hjá Antti Hotti, og í 2001-2002 lærði hon í Kekkia á Academy of Performing Arts í Prag við vegleiðing frá Peter Toperczer professara. Síðan heystið 2002 hevur hon verið studentur hjá Valeria Resjan á Helsinki tónlistaháskúla, og har gerst hon klaverlærari komandi ár.

Ann-Mari Peltonen hevur fingið tímar bæði í Finnlandi og í Ísrael, har hennara lærarar hava verið José Ribera, Liisa Pohjola og Nina Svetlanova. Hon hevur framført bæði sum einstaklingur og sum partur av kamarorkestri í Finnlandi, Kekkia og Eysturríki.

# LITRÍK KONSERT

**Tað verður ein konsert í øllum ælabogans litum sunnudagin 5. september, tá ið trý orkestur fyri menningartarnað fara at spæla av øllum lívsins kreftum.**

Ælabogin, orkestur teirra menningartarnaðu, er vertur, tá ið Ausjord Musikkorps og Hauge Musikkorp úr Noregi koma hendan vegin á vitjan.

Konsertferðin kom í lag, tá ið Ælabogin síðsta summar var á orkesturstevnu í Tróndheimi, avdúkar Eirikur Skála, ið saman við Anniku Højgaard og Ólavi Olsen standa við endan av ælaboganum.

Á stevnuni vóru seks onnur orkestur fyri menningartarnað. Ausjord Musikkorps og Hauge Musikkorps høvdu leingi ætlað sær til Føroya, og á stevnuni kom sambandið í lag og avtalur vóru gjørdar.

Á føroyaferðini eru 65 menningartarnað við ferðaleiðarum, og tey trý orkestrini hava hvør sær eina fjølbroytta skrá, ið fevnir víða. Ælabogin plagar at spæla populer løg sum Pink Panter, We will rock You og Yellow Submarine. Norsku orkestrini kunnu eisini tríva í ein marsj, so tað verður undirhaldandi. Gleðin við at spæla er drívmegin, ið við vissu smittar áhoyraran.

Norsku gestirnir koma higar mikudagin 1. september og fara avstað aftur mánadagin 6. september. Hósdagin 2. september hava tey skúlakonsertir, og fríggjadagin spæla tey í Fuglafirði. Leygardagin spæla tey í Havn.

Sunnudagin 5. september klokkan 16 verður so sjálv í Norðurlandahúsinum, har Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, setir konsertina í gongd.

# GRØNLENDSKT KÓR Á VITJAN

**Nógv umbidna grønlendska kórið "Aavaat" hevur konsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin 26. september klokkan 16.**

Kórið "Aavaat", sum varð stovnað í 1996, er eitt blandað kór við 28 sangarum. Sum navnið bendir á, er talan um eitt grønlendskt kór mannað við grønlendingum ella fólkum við tilknýti til Grønland. Kórið hevur heimstað í Keypmannahavn; tey flestu búgva á Sælandi, ein kemur úr Svøríki.

Kórið hevur tað sereyðkenni mótvegis øðrum kórum, at sungið verður á grønlendskum. Sambært endamálsorðingini skal kórið røkja og varðveita grønlendsku sangmentanina og fólkadansin, vísa umheiminum grønlendska mentanararvin og luttaka í ymsum grønlendskum mentanarligum tiltøkum.

Aavaat leggur eins stóran dent á varðveitslu og endurnýggjan. Málið er at varðveita ta heilt serligu grønlendsku sangmentanina við at taka gamla sálmar og sangir á skránna. Endurnýggjanin virkar á tveimum mótum. Øðrumegin syngur kórið sangir og sálmar í nýggjum hami. Tær flestu av nýggju útsetingunum hevur fjølráttaði kórleiðarin Mads Lumholt gjørt. Hinumegin skriva nøkur úr kórinum nýggjar tekstir til løg úr øðrum londum.

Kórið hevur verið rættiliga virkið hesi átta árini. Kórið hevur havt fleiri konsertferðir í Grønlandi og helt eitt nú fleiri konsertir í sambandi við 250 ára hátíðarhaldið fyri Qaqortoq í 1999. Kórið hevði eisini konsertferð saman við Margretu Drotning í 2000 í sambandi við 1000 ára haldið fyri Leiv Hepna. Margreta Drotning hevur fleiri ferðir biðið kórið luttikið við ymisk høvi, eitt nú til framsýningina Exop 2000 í Hannover, og tá ið hon vitjaði Ongland á statsvitjan sama ár. Aavaat varð eisini bjóðað til Kanada av ICC í 2002.

Harafturat hevur kórið óteljandi konsertir í Danmark og luttekur í nøkrum føstum tiltøk. Tey eru millum annað Grønland í Tivoli, konsert fyri fangum í Herstedvester og árliga felagskonsertin hjá føroyskum, íslendskum og grønlendskum kórum í t.d. Helligåndskirken.

Higartil hevur kórið givið tvær fløgur út. Tær eru Erinarsoqatigiit Aavaat og Erinarsoqatigiit Aavaat 2000, ið báðar hava eina fjølbroytta skrá við gomlum og nýggjum sangum í síðbundnum og nýggjum útsetingum.

# BURÐURDYGG NORÐURLENDSK BYGGILIST HEIMKOMIN

**Stórfingna framsýningin um burðardygga norðurlendska byggilist er nú komin til Føroya og verður at síggja í Norðurlandahúsinum frá 3. september**

Summarið 2002 varð skipað fyri felags norðurlendskum átaki í Berlin. Norðurlond settu sær fyri at vísa heiminum á, at umhvørvið er eitt avmarkað og viðbrekið tilfeingi. Farast skal væl um, tí komandi ættarlið skulu eisini nýta og njóta heimin, og hendan hugsanarhátt eiga fleiri vinnur at leggja sær í geyma.

Framsýningin vakti ans, og boðskapurin kom fram. Síðan hevur Burðardygg norðurlendsk byggilist ferðast í hinum Norðurlondunum.

Í heimshøpi eru Norðurlond smá, og tí má skipast væl fyri, tá ið byggjast skal. Stuttskygdar byggingar koma oftast aftur um brekku og enda við at verða kostnaðarmiklar. Hugtakið burðardygt fevnir ikki bara um skilagóða figging og rakstur. Hartil kemur týdningurin av, at samfelagið ella økið fær nakað aftur frá einari verkætlan.

Arkitektafelag Føroya bleiv sum sjálvstøðugur limur boðið at vera við á framsýningini í Berlin. Tvær føroyskar verkætlanir vóru tiknar við: Samanbygdu bústaðirnir inni á Gøtu í Hoyvík og verkætlanin Huld rúm í Álvagjógv í Hesti.

Báðar verkætlanirnar hava fingið virðisløn. Inni á Gøtu fekk sokallaða Kaleidoskopið frá danska arkitektafelagnum. Huld rúm fekk aðru virðisløn í tjóða arkitektafelagið fyri landslagsarkitektar skipaðu fyri.

Norðurlendsku limafeløgini hava valt ymiskar verkætlanir sum teirra bestu boð uppá evnið. Alt frá landslagslist, býarpartsverkætlanum, húsabygging til innbúgv. Yvir 30 glasmontrur við litføgrum plansjum, umframt nøkur modell av verkætlanum eru at síggja á framsýningini.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 3. september klokkan 17. og er opin til sunnudagin 12. september klokkan 18.

## SVARTUR OG HVÍTUR SYMBOLIKKUR

**Síðst í september letur listaframsýning upp í Norðurlandahúsinum við dananum Mikael Jensen. Talan er um sterkar symbolskar myndir, ið innihalda eina frásøgn.**

Mikael Jensen er føddur í 1953 á Frederiksberg. Hann er handilsútbúgvin, hevur bæði HA og HD, og harafturat hevur hann ognað sær vitan í Jungianskari sálarfrøði og myndatulking. Hann er sjálvlærdur og fór nústaðni at tekna í 1997.

Mikael Jensen hevði sínar fyrstu framsýningar á sumri 2000 í Norðurjútlandi. Hann hevur síðan verið við í fleiri sensureraðum framsýningum í Fraklandi, Bolivia og Danmark.

Listamaðurin leggur stóran dent á at siga eina søgu við sínum myndum. Innihaldið er tað týdningarmesta, sigur hann. Myndirnar eru ikki í litum, tí litir eru kenslur. Við at leggja myndirnar fram í svørtum og hvítum, skal tann skoðandi sjálvur leggja sínar kenslur í, og á tann hátt sigur listamaðurin seg virða kenslurnar hjá øðrum fólkum, heldur enn at diktera tær. Hinvegin er hann farin at forklára sínar myndir við tekstum undir, so fólk fáa hjálp til tulkingarnar.

Framsýningin hjá Mikael Jensen letur upp leygardagin 25. september klokkan 15.

## TVEIR TRUBADURAR Í ATLANTIS OG STÓRA PAKKHÚSI



**Norðurlandahúsið skipar saman við Atlantis fyri konsertum í Atlantis í Klaksvik og Stóra pakkhúsi í Vági við tveimum norðurlendskum trubadurum**

Talan er Per Warming úr Danmark og Johan Piribauer úr Laplandi, sum eru kendir hvør í sínum lagi í sínum heimlandi.

Per Warming er sangari, rithøvundur, háskúlalærari og ikki minst ein frálíkur frásøgumaður. Hann er viðurkendur fyri at samantvinna fyrilestur og fólkasang og hevur móttikið "Den folkelige sangs pris" og "Gelsted-Kirk-Scherfig-Fondens kulturpris". Per Warming er 60 ár, býr í Keypmannahavn. Hann livir sum rithøvundur og sangari og hevur innspælt fleiri fløgur við vísusangi.

Johan Piribaur hevur útgivið fýra fløgur við egnum sangum. Tann blandingin av svenskum vísutóna og samfelagsáhuga, sum vit kenna frá Bjørn Afzelius og Michael Wiehe, fekk sína egnu rødd í Laplandi við Johan Piribauer.

Teir báðir hava havt konsertir saman við klaksvíkinginum Jógvan Andrias á Bryggjuni í Keypmannahavn fyrr í summar.

Fríggjakvøldið 3. september klokkan 21 hava teir konsert í Atlantis í Klaksvík.

Leygarkvøldið 11. september klokkan 21 framføra teir í Stóra pakkhúsi í Vági.